**Tit ringja — vit skriva**

Er nakað á vási? — Ivamál?
Ein spurningur, ella tíðindi, so ring til okkara
Vit eru til reiðar!
Telefon 118 20 - Telefax 147 20

tíðindablaðið **sosialurin**

**Lýsingar**

Lýsingarfólk okkara er ráðgevari hjá fyritøkum og einstaklingum í lýsingarspurningum. Hetta verður gjørt uttan meirkostnað fyri lýsaran
Telefon 118 20 - Telefax 147 20


# veðrið

Hátrýst verður næstu dagarnar yvir Norðsjóarleiðunum. Eitt djúpt lágtrýst rekur í vikuskiftinum í landnyrðing yvir Danmarkarsundinum. Tilhoyrandi brúgvaløg við regni fara yvir Føroyum leygardagin seinnapartin ella út á kvøldið og frískur, men lýggjur vindur rekur móti Føroyum av útsynningi. Nýtt lágtrýst nærkast Íslandi av útsynningi týsdagin.

## Leygardagin



Frískandi til millum fríska lot og hvassan vind, 10–15 m/s, av suðri og útsynningi, ádrigið, driv ella mjørki í støðum, regn seinnapartin og vánaligt sýni. Móti kvøldi upp í hvassan vind, 15 m/s, av vestri, minni avfall og frægari sýni. Hitin alt samdøgurið millum 7 og 11 stig.

## Sunnudagin

Strúkur í vindi upp í skrið, 13–18 m/s, av vestri og útsynningi, fyrrapartin lutvíst ádrigið, hendinga æl, annars gott sýni og eisini sólarglottar, seinni ádrigið, ælingur og vánaligari sýni. Hitin millum 6 og 9 stig.

## Mánadagin

Strukur í vindi upp í skrið, 13–18 m/s, av útsynningi, ádrigið, tám, regn í skiftum ella driv og bert toluligt ella vánaligt sýni. Hitin millum 8 og 11 stig.

## Týsdagin & mikudagin

Einamest millum strúk í vindi og skrið, 13–18 m/s, av útsynningi at byrja við, seinni av suðri, ádrigið, tám og stundum driv. Sama lýðka, millum 8 og 11 stig.

# óli teknar

©1994 Sosialurin/Óli Petersen

## *Holið í Lopra*




Tingmenn eru rúkandi ósamdir um, hvat ið hendir, um hildið verður áfram at bora í Lopra. Her er eitt uppskot.


**PHILIPS 100 Hz**
Heimsins bestu sjónvørp - við myndini, ið als ikki ristir
**marstein** DISCOUNT
Árvegur - Tlf. 11300 - 11305

Hotel Føroyar
Tlf. 17500 við útsýninum
Sunnudag er opið
kl. 12:00–15:00
kl. 18:00–21:30
SUNNUDAGSDØGURÐI
v/ 3 rættum
EINANS 135,-
Altíð vælkomin á Hotel Føroyar

**Storno**
900 MHZ
vigar bert 235 gr.
**Storno**
Handan Á 6 - Tórshavn
Tlf. 14414 - Fax. 18045

**SOSIALURIN**
**– einasta blað 5 ferðir um vikuna**

BLÁDÝPI
bjóðar einstaklingum og bólkum gott og bíligt innivist - á sumri og á vetri!
Dr. Jakobsensgøta 14-16
Tel: 11951 Fax: 19451


## Vestfalskyrrindi

26. november: Seinna kvarter
2. desember: Tendring/mán. næstur jørðini

| Dato | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | Haraldssundi/Leirvíksfirði fp. | sp. | Skúvoyarfirði/Skopunarfirði fp. | sp | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 26. nov. | – | 1231 | 0156 | 1431 | 1046 | 2321 | 0011 | 1246 | 1131 | – | 1146 | – |
| 27. nov. | 0106 | 1342 | 0306 | 1542 | 1157 | – | 0121 | 1357 | 0006 | 1242 | 0021 | 1257 |
| 28. nov. | 0204 | 1427 | 0404 | 1627 | 0019 | 1242 | 0219 | 1442 | 0104 | 1327 | 0119 | 1342 |
| 29. nov. | 0249 | 1512 | 0449 | 1712 | 0104 | 1327 | 0304 | 1527 | 0149 | 1412 | 0204 | 1427 |